**Misvísandi feilur viðvíkjandi freistini fyri innlating**

Freistin at lata tilboð inn er farin og vit eru gjørd varug við, at á Keypsportalinum stendur 25. januar meðan í viðhefta útboðstilfarinum, á síðu 7, stendur sunnudagur 25. januar (25. Januar er týsdagur). Seinni í útboðs tilfarinum, á síðu 8, stendur røttu datoina, t.v.s. týsdagur 25. Januar.
Um hesin feilurin, ella aðrar orsøkir eru til, at veitarar ikki hava latið tilboð inn, gera vit vart við, at Undirvísingarstýrið hevur gjørt av, at leingja freistina til týsdagin 01. februar.

**Freistin at lata tilboð inn er longd til týsdagin 01. februar 2022, kl.23:59**

Ein veitari hevur tikið feil av freistum. Freistin til útboðið fyri UX/UI- sniðgeva var sett til 25. januar, og fyri mennarar var freistin tann 01. februar. Veitarin hevur hildið, at freistin fyri bæði útboðini var 01. februar. Hetta hevði við sær, at veitarin ikki hevur latið inn, tað tilboðið, sum hann ætlaði.

Nýggja freistin er sjálvsagt eisini galdandi fyri teir veitararnar, sum hava latið tilboð inn. Tað vil siga, at hesir hava møguleika at endurskoða síni tilboð og lata tey inn til nýggju freistina.